# ítróttur

Nr. 68 • hósdagur • 11. apríl 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

## Fríðin fer til B68



*Fríðin Ziskason skiftir felag. Hann fer framyvir at spæla við B68. Her er hann í dysti fyri gamla felag sítt, KÍ, í steypafinaluni á Tórsvølli í fjør*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Fríðin Ziskason, sum higartil hevur spælt við KÍ, skiftir nú felag til B68. Hann sigur, at vantandi spælitíð er orsøkin til skiftið, og hann vil eisini royna eina nýggja avbjóðing**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

B68 hevur styrkt um hópin við enn einum leikara. Talan er um miðvallarleikaran Fríðin Ziskason, sum kemur úr KÍ.

Fríðin váttar fyri Sosialinum, at hann fyrstu ferð vandi inni á Toftum týskvøldið, og alt bendir á, at B68 verður hansara nýggja felag. Hin klaksvíkingurin í B68, Arnold Joensen, fær sostatt fylgi úr Klaksvík, tá teir skulu venja.

– Eg setti meg sjálvur í samband við B68, og teir vóru sera áhugaðir í at fáa meg út á Toftir at spæla, sigur Fríðin Ziskason, sum leggur doyðin á, at hann ikki er vorðin ósamdur við venjaran Kurt Mørkøre.

– Hjá KÍ eru nógv fólk um boðið, og tað vísti seg, at eg ikki slapp at spæla nóg mikið, sigur hann, og tí valdi hann at skifta felag.

Hann heldur ikki, at tað verður so nógv lættari at sleppa á lið hjá B68, tí nýggja felag hansara hevur eisini gott fólk og fleiri landsliðsleikarar, men hann vísir á, at spælið hjá B68 hóskar betur til hansara.

– Hetta er ein nýggj avbjóðing hjá mær, og eg vóni at fáa meira spælitíð, hóast B68 ikki hevur verri fólk enn KÍ, sigur hann.

Svend Jacobsen, formaður í KÍ, sigur, at Fríðin setti seg í samband við leiðsluna við ynski um at skifta felag, og hesum hevur leiðslan givið leikaranum loyvi til. Eftir er bara at fáa smálutirnir millum KÍ og B68 í sambandi við skiftið uppá pláss.

Fríðin, sum er 29 ára gamal, er sterkur miðvallari, men hann kann eisini spæla í verjuni. Hann spældi sín fyrsta dyst á besta liðnum hjá KÍ í 1989, og hann vann FM-heitið í 1991. Fríðin sigur, at hann hevur spælt eini 200 dystir tilsamans fyri KÍ, tá venjingardystir eisini verða taldir við.

Reglurnar siga, at ein leikari er leikbannaður í ein mánað, tá hann skiftir felag, og tí verður Fríðin ikki at síggja í B68-troyggjuni, fyrr enn landskappingin byrjar.

## B68 møtir liði úr Sveis

INTER TOTO
*Stefan í Skorini*

B68 skal aftur í ár umboða Føroyar í Intertoto Cup, sum UEFA skipar fyri. Lutakast var týsdagin í franska býnum Nyon um, hvussu spælast skal í fyrsta umfari í kappingini. Lutakastið háttaði seg soleiðis, at B68 skal møta einum liði úr Sveis í fyrsta umfari.

Hvat mótstøðuliðið verður er ikki greitt fyrr enn 8. mai, tá landskappingin í Sveis endar. Fyrri dysturin verður leiktur í Sveis 22. juni, og seinni dysturin verður leiktur á Toftum eina viku seinni. Liðið, sum fer víðari, skal møta einum liði úr Hollandi í øðrum umfari.

## Navnakapping um bát

**Klaksvíkar Róðrarfelag fer í mei at flota eitt nýtt 5-mannafar, og í hesum sambandi verður skipað fyri navnakapping, og vinningurin er 1.000 krónur**

KAPPRÓÐUR
*Stefan í Skorini*

Enn hevur róðrarfelagið ikki funnið navn til nýggja bátin, og tí verður ein kapping útskrivað, um hvør kann finna besta navnið. Vinnarin fær 1.000 krónur fyri ómakin.

Umframt tað nýggja 5-mannafarið hevur róðrarfelagið seks aðrar bátar. Teir eru 5-mannaførini Fípan Fagra og Snípan, 6-mannafarið Páll Fangi, 8-mannaførini Nevið Reyða og Havrenningur og 10-mannaførini Klaksvíkingur.

Róðrarfelagið sigur í tíðindaskrivi, at uppskotið skal vera navnaleyst og bera frámerki, sum er fimm tilvildarlig tøl. Saman við uppskotinum skal vera ein afturlatin brævbjálvi við sama frámerki á. Í tí afturlatna brævbjálvanum skal vera ein navnalepi, ið sigur frá navni, bústaði og telefonnummari.

Nevndin tekur støðu til innkomnu uppskotini, og hon tilskilar sær eisini rætt til ikki at nýta nakað av teimum uppskotunum.

Síðsta freist at senda uppskot inn er 22. apríl, og ein møguligur vinnari verður kunngjørdur á heimasíðu felagsins www.krf.fo tann 28. apríl. Uppskotini skulu sendast Klaksvíkar Róðrarfelag, postsmoga 358 í Klaksvík.

## KÍ kvinnurnar fingið venjara

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Odd Færø er settur sum venjari hjá kvinnuliðnum hjá KÍ. Jón Harald Poulsen hevði annars játtað at taka við enn eitt ár, eftir at hann hevði verið venjari hjá kvinnuliðnum í fjør.

Hann tók seg tó aftur, og nú hevur Odd Færø fingið fyribils ábyrgd av liðnum, sum vann FM-heitið í fjør. Hetta sigur formaðurin í KÍ, Svend Jacobsen.

Odd hevur tikið øll grundskeiðini fyri venjarar hjá FSF, og hann hevur verið venjari í ungdómsdeildunum hjá KÍ frammanundan.

# Bilar

Nr. 68 • hósdagur • 11. apríl 2002 • 76. árg.

## Dekkini skulu verða E-merkt frá 1. apríl

**Í Danmark skulu allir nýggir bilar, ið verða skrásettir eftir 1. apríl í ár, hava E merkt dekk. Hetta er eisini galdandi, um teir skulu skifta til vulkaniseraði dekk seinni. Sum tann fyrsta fyritøkan í Danmark, og ein av teimum fyrstu í Evropa, vóru vulkaniseraðu dekkini hjá Tobøl Dæk A/S, fyri hálvum øðrum ári síðan, góðkend eftir nýggju ES reglugerðunum**

DEKK
*Magnus Gunnarsson*

Frá 1. apríl av skulu allir nýggir bilar í Danmark hava ECE góðkend dekk. Persónbiladekk skulu merkjast við R-108 og dekk til lastbilar og bussar við R-109. Síðan tey vulkaniseraðu dekkini av fyrstan tíð komu á marknaðin, hava tað verið deildar meiningar um slitstyrkina og kvalitetin sum heild, og tað av góðum grundum. Ógvuliga ymiskt hevur verið sum arbeiðið við sjálvari vulkaniseringini hevur verið gjørt, og í hvørjum standi dekki eru, tá slitbanin verður lagdur á.



*Fríðrikur Bláhamar frá Super Dekk og Erik N. Rasmussen frá Tøbøl Dæk, ið eisini er formaður í "Fabrikantforeningen for Regummierede Dæk". Fyritøkan hjá honum er ein tann fremsta vulkaniseringsverksmiðjan í Evropa*

### Fleiri máttu gevast

Erik N.Rasmussen, stjóri á Tobøl Dæk, og formaður fyri "Fabrikantforeningen for Regummierede Dæk", sigur at nýggju lógarkrøvini hava havt við sær, at fleiri danskir dekkframleiðarar hava verið noyddir at gevast, tí tað er ov kostnaðarmikið at leggja um til tey strongu ES krøvini. Erik N. Rasmussen er javnan í Føroyum og vitjar sínar kundar saman við fólki frá Super Dekk við Hoyvíksvegin, ið umboða Tobøl dekkini her.

## Renault Espace - sum luksus MPV í 2003



*Renault Espace, ið kemur á marknaðin í 2003, verður ein stórur luksus MPV*

**Hóast Renault Espace hevur verið á marknaðinum síðan 1984, hevur hann ikki verði seldur í Danmark áður. Saman við Chrysler Voyager vóru Renault Espace fyrstir við MPV bilum. Tá nýggi Espace kemur á marknaðin í 2003 verður hann eisini at fáa í Danmark og Føroyum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Tá Renault komu við teimum fyrstu Espace í 1984, vendu teir upp og niður uppá hvussu ein persónbilur eisini kann síggja út og verða innrættaður. Bilurin var stórur, rúmligur og sera brúkaravinarligur, við tað at hann hevði heilt slætt gólv við skinnarum, soleiðis at setrini kundu flytast eftir egnum ynski.

### 3.0 dCi diesel

Næsta ár kemur so ein heilt nýggjur Espace á marknaðin. Hesaferð verður talan um ein luksus MPV, sum er gjørdur við teimum stóru Renault Avantime og Renault Vel Satis sum fyrimynd. Til dømis fæst hann við einum 6 syl. 3.0 dCi turbodiesel motori við 180 hk og 5 trins automatiskum Proactive gearkassa, við møguleika at skifta manuelt. Bilurin kemur á marknaðin næsta ár.